### Føðingardagsheilsa til

*Jógvan Nónsgjógv á 70 ára degnum*

Tað má sigast at vera beinrakni tá skaldið Fr. Petersen yrkti sálmin: »Tíðin rennur sum streymur í ár«. Vit mugu tó ásanna at vit fylgja við, men gerast kortini eldri so hvørt árini líða.

Hvør skuldi trúð tí, at Jógvan longu er komin so mikið til árs, men tað sleppur eingin undan, men hevur ein heilsuna tá gera árini ikki so nógvan mun.

Farið ikki á hesum sinni, at gera so nógv burtur úr lívi tínum sum gjáarmaður, men at tú hevði verið ein góður borgari fyri Gjáar bygd tað kennir hvørt mansbarn í bygdini til, og var títt dagsverk skrivað í bók, ja so fylti tað fleiri hundrað síður.

Eg vil á hendan hátt ynskja tær hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum sum verður 19. januar, við Guds ríku signing í komandi tíðum, við brot úr yrkingini hjá S. M. Zachariassen, sum hann yrkti 1895:

Og, faðir góði, signing gev,
tí annars batar ei mítt strev,
eg ongan frama fái.
Um dagsverk mítt skal eydnast mær,
eg studning fáa má frá tær,
tú mást mær geva náði
til at virka
tær til æru,
hvar eg fari;
bøn mín leita
skal til tín um hjálp at veita.

**Bergfinn Joensen**







útsøla

Mánamorgunin 22.01.
byrjar útsølan.

Øll vøra ÷50%

Vit hava barnaklæði
0-16 ár



BAMSAN
v/ Charlotte Ellendersen
N. Finsensgøta 25 • 100 Tórshavn
Tel. 32 11 11

Sosialurin - 311820


# Atlantsljómur í Andans heilagu Kirkju

Í hávetur-summar-veðrinum við trevjagøtuna Strøget liggur hugnaliga kirkjan Helligåndskirken og goymir at fornum ljóði og skuggum av menniskjakroppum, ið darta út og inn tann líðilanga dag – vakir yvir sálum, sum ikki eiga sýru í vegg, men flyta seg fram við hesar múrar á stummari nátt eins og øskulittir vetrarfuglar við fjøruklett.

Leygardagin 2. des. var rungandi ljómur í hesi kirkju av Kappanum, um Reykjanes í Enniberg. Fólk uppvaksin undir Norðlýsinum komu inn um kirkjugátt við sínum heimliga húsroyki og funnu sær ein sess á eikifjølum úr miðaldarligum grøngrónum runnaskógi. Synd at siga at hetta var rekaviður úr Søltuvík, tú sat á. Einki ormetið sprek er undir hesum bitum í hesi kikju í kongaliga staðnum. Her skortaði einki. Náðiligir hava danir ikki verið, tá ið bygningar hava verið reistir í Keypmannahavn úr svørtu miðøld til dagin í dag.

Gomlu kirkjunar heima á landi næla ikki úr rossasporið í so máta, men andaliga royndust tær og hava staðið seg væl móti sjóráma, vindi, stormi og brennandi sólskinni eins væl sum hesar burðardyggu, steinsettu glastrikirkjurnar í danska høvuðsstaðnum.

Nógv fólk trein inn um kirkjugátt henda seinrapart. Ikki komu tey at lurta eftir háfloygdum, listakendum kórsangi, men vildu bert hoyra jólaløg á sínum eygna máli. Tikið verður onkuntíð til: Eymur er hann, ið agni sparir - …… og eymur er tann, sum av landi er skotin, um føroyskt mál, føroyskan skaldskap og føroyskan sang. Tað var hetta, sum hekk uppi yvir tær, tá tú so smeikin leitaði tær sess á onkrari eikifjøl mannfólkamegin hesa sangløtu upp undir adventina ár 2000 í vøkru Heilagu andans Kirkju.

Fleiri av teimum, sum komu inn eftir gólvinum, eru vaksin upp á smáum plássum. Hetta vóru bygdafólk. Tað var eins og leitaðu tey sær í sama stólin sum heima. Har sum foreldur, abbar og ommur høvdu sitið í ár so mong – boygt høvur, sungið og lurtað. Løtan var vígd tær og tínum, málinum, adventini, teprum mánlýsi yvir Blábjørgum, Gjógvarafjalli og jólunum.

Lat tað verða sagt, at hesi kór vóru ikki sør. Herluf sáli, plagdi at siga: Vit syngja, tí okkum dámar at syngja. Sanggleðina skrivaðu tey í kirkjuvegg, tróðrið, altarborð og doypifunt. Harpa Harðardóttir leiddi íslendska kirkjukórið í Keypmannahavn, sum lat íslendskt í heimligan jólasang og rák av útlendskum jólaløgum í skrúð av Bessastøðum í Akranes.

Íslendska kvinnukórið í Keypmannahavn – stjórnað av Sigriður EyÞórsdóttir, sang sera yndisliga – javnt, reint og kvinnuliga. Tann íslendska kvinnan er so hábærslig. Haldi ikki taki munnin ov fullan, at hennara høvuðburður ber av frælsi og aldargomlum mentanar húsroyki í máli og skaldskapi Íslendara eiga nógv góð manskór, men teir hava sanniliga eisini góð kvinnukór, og hetta útisetrakórið smæddist ikki burtur.

Grønlendara høvdu tvey kór Mik og Aavaat. Mik var tað minna kórið og ikki skortaði sanggleðin í hesum kórum. Sangararnir livdu við í tí, ið sungið varð. Í hesum kórum kendist stór sanggleði. Tú bleiv góður við sangin, ið borin varð fram, hóast tú lítið skilti av tí, ið sungið var, men neistin av hesum løgum glógvaði í eygunum á sangarunum. Norðurlendingar og evropear hava mist nakað her. Vit hava ilt við at tóna út í sanginum og vísa okkara gleði. Hetta duga grønlendingar. Yndisligar vóru tær grønlendsku kvinnurnar í tjóðbúnaðinum. Okkara búni er vakur, men, men telist ikki tann grønlendski kvinnubúnin millum vakrastu búnar í heiminum? Mik var undir leiðslu av Margit Gjødsbøl Farsø og Aavaat undir leiðslu av Mads Lumholt.

Í Húsakórinum var nógv fólk undir leiðslu av Sunnleif Rasmussen. Kvinnurnar vóru í tjóðbúna og stóðu tær fremst sum yndisligar snjósóljur, sóu gott út og goymdu at monnunum ….minnist meg rætt vóru teir í myrkum klæðum, summir við opnari skjúrtu, onkur við slipsi og ikki so fáir í hvítari skjúrtu. Kórið tók seg væl út, og var hetta stórsta kórið á hesi konsert. Tú hevði vænta gnellandi ljóm úr hesum hópi, men so var ikki. Hugsast kann, at Sunnleif hevði valt at haldið ljómin á einum støði, har javnvág var ímillum røddirnar. Hetta er ein góður máti, hóast summum dámar betur at sopranirnar bera øllum uppi og hinar røddirnar eru grundin undir kórljóðinum.

Kórið kastaði væl uppá- Eitt barn er føtt…. Eg gleðist so….Lítla barn í fjósi….. Tað sótu seyðamenn á vakt. Taldi tú eyguni, hugsi eg, at Sunnleif misti ikki nakað eygað hesa løtu við kóri sínum av sangbulinum. Útisetum er hetta til mikla tign og miklan sóma at halda fast við føroyskan sang, føroyskan skaldskap og føroyskt mál. Bókadagin í Føroyahúsinum sang kórið yrkingar av Chr. Matras, so hetta kór hevur alstóran týdning fyri trivnaðan millum sangglaðar føroyingar í høvuðsstaðnum.

Felagssangur var eisini á skránni og endaði konsertin við einari grønlendskari jólasálmi – Tussiaqatigiinneq – orð: Rasmus Berthelsen (uml.1855) lgtr: Johan Kleist, har øll reistu seg úr sati, og sungu av hjarta. Lagið er sera innarligt, og var hetta ein góður endi á einari konsert, sum var fyri útisetar, sum eru eymir og góðir við tað, sum er teirra.

**Frits Johannesen**



# ítróttur

Nr. 14 • leygardagur • 20. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroyameistararnir til Sørvágs

**Orsakað av, at stór kapping verður fyri yngru deildirnar í Klaksvík hetta vikuskiftið, verða ikki nógvir dystir leiktir í meistaradeildini hjá kvinnum og monnum**

FLOGBÓLTUR

Føroyameistararnir, Fleyr, skulu sunnudagin til Sørvágs at leika ímóti SÍ, og um ein tekur úrslitini sum hava verði higartil í ár, so skuldi ikki verið nakar ivi um at tað verður havnarliðið, sum vinnur ein tryggan sigur.

Tó kann alt henda í Sørvági, um liðið hevur allar leikarar tøkar. SÍ vann seinasta vikuskiftið eitt sett ímóti Fram, so ikki er óhugsandi, at teir kunnu gera eitt ella annað á heimavølli.

Dysturin í Sørvági verður kl. 16.00 sunnudagin.

### Dráttur skal møta Fleyr

Bert tveir kvinnudystir vera hetta vikuskiftið. Dráttur skal møta Fleyr, sum í seinastu viku óvæntað tapti 3-1 ímóti ÍF, men seinni vann 3-1 á Fossánesi. Um Dráttur framvegis skal varveita oddasessin, skal eisini hesin dysturin vinnast, tí Mjølnir, sum er ájavnt í stigum og hevur verið Føroyameistari í fleiri ár, liggur bara og bíðar eftir møguleikanum, at vágaliðið skal snáva.

Dysturin á Giljanesi byrjar kl. 13.00 sunnudagin.

### Eisini í Trongisvági

Hin dysturin í meistaradeildin hjá kvinnum verður í Trongisvági ímillum TB og Fossánes. Fossanes hevur higartil ikki fingið nakað stig, so í prinsippinum skuldi hetta verið ein avgreiðsluspurningur, men seinasta vikuskiftið vann liðið sítt fyrsta sett í landskappingini, so um TB ikki hevur eyguni við sær á vøllin, kann sigurin fara norður um fjørðin.

Dysturin byrjar í Trongisvági kl. 13.00

# Tvær ferðir VB

**VB fer norður um fjørðin um vikuskiftið, har tær skulu gera teir báðar fyrstu dystirnir í endaspælinum av sær**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast landsdystirnir móti Litava standa á skránni, so liggur allur fyrstudeildarhondbóltur í landinum ikki lamin. VB fer norður um fjørðin, og sum tær so ofta gera, verða tveir dystir at avgreiða hjá teimum.

Tann fyrri av hesum verður í høllini á Giljanesi, har uppflytararnir úr Sóljuni taka ímóti leygardagin. Sunnudagin gongur leiðin so til Havnar, har tær spæla undan landsdystinum.

Í grundspælinum endaði VB við einum sigri á Stjørnuni, og einki er at taka seg aftur í, at tær ætla at halda fram við at vinna dystir sínar. Nakað sum eisini er neyðugt, um tær skulu gera sær vónir um at vinna seg longur upp á stigatalvuna. Hetta skuldi eisini verið gjørligt, um hugt verður at úrslitunum úr grundspælinum, men serliga kann dysturin móti Neistanum vísa seg at vera torførur, nú havnarliðið hevur fingið Katrin á Neystabø við aftur á liðið.

VB hevur tó til tíðir spælt sera væl í ár, og megna tær at finna rætta spælið fram, er einki at ivast í, at tær fara at hava fýra stig við sær, tá tær sunnukvøldið leggja leiðina suður aftur um fjørðin.

**Støðan 1. deild kvinnur**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 389 | 211 | 178 | 14 |
| 2. Stjørnan | 1 | 0 - 0 - 1 | 353 | 288 | 65 | 10 |
| 3. VB | 0 | 0 - 0 - 0 | 304 | 227 | 77 | 9 |
| 4. Neistin | 0 | 0 - 0 - 0 | 256 | 269 | -13 | 5 |
| 5. Kyndil | 0 | 0 - 0 - 0 | 270 | 323 | -53 | 5 |
| 6. Sóljan | 0 | 0 - 0 - 0 | 218 | 319 | -101 | 2 |
| 7. Tjaldur | 0 | 0 - 0 - 0 | 169 | 322 | -153 | 1 |

# Alexei Shirov vælkoyrandi í Wijk aan Zee

**Í krútsterku stórmeistarakappingini hevur Shirov eftir fimm umførum lagt út við fullari megi, meðan Kasparov og eitt nú Kramnik eisini hava fingið góða byrjan. Tað mest áhugaverda talvið var hósdagin tá Kasparov og Kramnik telvaðu, og hóast kasparov hevði munin varð úrslitið ikki óvæntað javnleikur**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í hesum døgum leikar hart á hjá fjúrtan stórmeistarum í hollendska bynum Wijk aan Zee, og tað hevur so sanniliga eisini verið at sæð á talvborðunum. Lang og áhugaverd talv sum eru merkt av vinnaravilja er skráin hvønn dag. Allir skulu telva ímóti hvørjum øðrum, tað vil siga trettan umfør.

Telvað eru nú fimm umfør, í gjár var frídagur og sætta umfar verður telvað í dag.

Kasparov legði best út við at vinna tvey tey fyrstu talvini, men hevur síðani leikt tríggir javnleikir á rað, har tann seinasti var ímóti heimsmeistaranum Kramnik, sum eisini hevur hálvtfjórða stig. Talvið teirra millum er í blaðnum í dag. Ein annar av kanónunum hevur somuleiðis hálvtfjórða stig, nevnliga tann álopssinnaði, ungi russin Morozevich.

Fide heimsmeistarin Anand hevur ikki rættiliga sett ferð á við sínum fyra javnleikum og einum vunnum talvi. Ein av javnleikunum varð ímóti Kasparov.

Fide HM finalisturin Shirov hevur hinvegin sett sína egnu kós, og higartil hevur hon hilnast væl. Try vunnin talv og tveir javnleikir gevur honum fyrsta pláss, men hann hevur tó ikki enn møtt Kasparov, Kramnik ella Anand, so enn er ringt at meta um hansara møguleikar.

**Støðan eftir 5. umfar:**

1. Shirov 4 stig
2. Kasparov 3,5
3. Kramnik 3,5
4. Morozevich 3,5
5. Adams 3
6. Anand 3
7. Ivanchuk 2,5
8. Timman 2,5
9. Leko 2
10. Topalov 2
11. van Wely 2
12. Fedorov 1,5
13. Piket 1,5
14. Tiviakov 0,5

Øgiliga javnt í oddinum, men ikki óvanligt tá so javnir telvarar luttaka. Vert er at nevna støðuna hjá Timman. Hann hevur møtt heilt sterkari mótstøðu; Kramnik, Morozevich, Topalov, Leko og Shirov og hevur 50%. Enn kann hann, tann 49 ára gamli hollendarin Jan Timman.

Hevur Timman yvirraskað á ein positivan hátt, hava Leko og Topalov fingið heldur ringa byrjan, men í niðara endanum enda teir allarhelst ikki eftir lokna kapping.

**Í dag hittast:**
Shirov-van Wely
Morozevich-Kasparov
Kramnik-Anand
Leko-Adams
Piket-Timman
Fedorov-Ivanchuk
Topalov-Tiviakov

Eftir at vit nú hava tveir heimsmeistarar, Kramnik og Anand, vera nógv eygu vend ímóti teirra dysti í dag. Tosað hevur verið um sokallaðan World Prestige Match millum teir seinni í árinum, men einki er avgjørt í hesum malið.

Fylgjast kann við talvunum og kappingini live á fleiri heimasíðum. Her eru tvær teirra; www.kasparovchess.com og www.corus-group.com/coruschess/home.html, har eisini fleiri webkamera fylgja við.

**Talvið hesa vikuna**
Kasparov,G (2849)-
Kramnik,V (2772)
Corus2001 Wijk aan Zee (5),
18.01.2001

1.e4 e5 2.Nf3 Nc6 3.Bb5 Nf6 4.0-0 Nxe4 5.d4 Nd6 (Kramnik velur frábrigdi Berlin Wall í sponsku byrjanini. Hetta gav honum góð úrslit í HM dystinum ímóti júst Kasparov) 6.Bxc6 dxc6 7.dxe5 Nf5 8.Qxd8+ Kxd8 9.Nc3 Ke8 10.h3 Be7 11.Bg5 Bxg5 12.Nxg5 h6 13.Nge4 b6 14.Rfd1 Ne7 15.f4 Ng6 16.Rf1 h5 17.Rae1 Bf5 18.Ng3!? Ne7 (Ikki gott er at taka á c2 vegna 19. f5) 19.Nxf5 Nxf5 20.Kf2 Nd4 21.Rc1 Rd8 22.Rfd1 Ke7 23.Ne4 h4 24.b4 (við h4 steðgar Kramnik kongafinnum, meðan b4 steðgar a5 og c5. Sera positionelt telva av báðum) Rh5 25.Ng5 Rhh8 26.Rd3 Ne6 27.Nxe6 Kxe6 28.Rcd1 Rd5 29.c4 Rxd3 30.Rxd3 a5 31.bxa5 Ra8 32.Ra3 Kf5 33.Kf3 Ra6 34.c5!



(her fær kasparov nærum vinnandi fyrimun, men nú setur Kramnik alla sína sterku verjuskipan í gongd) f6 35.Re3 Rxa5 36.e6 Ra8 37.e7 Re8 38.a4 Kg6 39.Re6 Kf7 40.Rxc6 Ra8 41.cxb6 cxb6 42.Rxb6 Rxa4 43.Re6 Ke8 (43...Ra8 tapir vegna 44. e8 Rxe8 45. Rxe8 Kxe8 46. Kg4) 44.Re4 Ra3+ 45.Re3 Rxe3+ 46.Kxe3 f5 javn